# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Heppin Berlingo vinnari

**Mánadagin 12. september 2005 fekk Elisabeth Hammer í Runavík handaðan ein spildurnýggjan Citroën Berlingo, sum var høvuðsvinningurin í lutaseðlasøluni hjá Skála Ítróttarfelag**

TÍÐINDASKRIV

Hepni vinnarin í lutaseðlasøluni hjá Skála Ítróttarfelag í summar, ið var ein Citroën Berlingo 1.6 Multi Space, gjørdist Elisabeth Hammer í Runavík.

Á hugnaligari samkomu hjá Ivan Johansen Bilum fekk hon lyklarnar til tann spildurnýggja bilin.

Formaðurin í Skála Ítróttarfelag, Hans Jákup Andreasen, handaði Elisabeth Hammer lyklarnar, og Pauli Waag, sølumaður hjá Ivan Johansen, gav henni eitt blómutyssi.




*Seinnapartin mánadagin 12. september fekk Elisabeth Hammer nýggja bilin í á bilasøluni hjá P/F Ivan Johansen við Hoyvíksvegin í Havn, f.v.: Elisabeth Hammer, Pauli Waag, sølumaður, Hans Jákup Andreasen, formaður í Skála Ítróttarfelag, og maður Elisabeth, Johan Hammer*

Hóast tað gingu nakrir dagar, áðrenn funnið var fram til, hvør hevði tann nógv umtalaða lutaseðilin, so vísti tað seg kortini, at hepni vinnarin skuldi finnast í nærumhvørvinum í Eysturoy.

Tá bilurin var handaður nýggja eigaranum, lat hon manninum lyklarnar, tí hann skuldi sleppa at koyra bilin fyrsta túrin inn á Skálafjørðin saman við tveimum abbabørnum.

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Hemming Petersen, Klaksvík**, fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikudagin klokkan 18. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 13 úr Betesda. Tey, ið ynskja at lata blómur ella krans kunnu í staðin lata Kristnastovu eina peningagávu. Konto í peningastovnunum.

Kistan við **Hallgerð Didriksen, Vestmanna**, fer úr Vestmanna kirkju mikudagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Hallgerð, kunnu lata Eldrasambýlinum í Vestmanna eina gávu. Konto í peningastovnunum.

**Páll Petersen, úti á Boðaneshamri í Havn,** fer til gravar úr Havnar Kirkju mikudagin klokkan 14.

**Meinhard Andreassen, ættaður úr Fámjin, búsitandi í Havn,** andaðist sunnudagin 18. september á Landssjúkrahúsinum, 70 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum týskvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Evangeliihúsinum mikudagin klokkan 15. Tey, ið vilja minnast Meinhard, kunnu lata Herberginum hjá Frelsunarherinum eina gávu. Konta í peningastovninum.

Tekniski Skúlin, Tórshavn:

## Sjey bilsmiðir fingið prógv



*Fríggjadagin 16. september 2005 fingu sjey bilsmiðir prógv á Tekniska Skúlanum í Havn, f.v.: Byrger Heinsen, Klaksvík, lærupláss: Bil- og Dekkverkstaðið, Eirikur Olsen, Tórshavn, lærupláss: P/F Meinhardt Arge, Guttorm Eliasen, Klaksvík, lærupláss: Bil- og dekkverkstaðið, Hans I. M. Øster, Kvívík, lærupláss: Reyni Service, Hans Ingi Joensen, Tórshavn, lærupláss: Bilasølan, Kristoffer Vidtfeldt, Sandur, lærupláss: Bil- Maskinverkstaðurin, og Poul Johan A. Dahl, Tórshavn, lærupláss: P/F Wenzel*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ
Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Ført tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin "Nøvn í vikuni" Tel.341800 / 216135 Teldupost: maggi@sosialurin.fo

W W W . S O S I A L U R I N . F O